## DAGSINS MEINING

# Fólkafloksálit

Óli Breckmann hevur ikki verið, er ikki, og fer neyvan aldrin at verða nakað ynskibarn at vera í samgongu við. Tjóðveldismenn vakna nú við kaldan dreym og síggja, at Fólkaflokkurin ikki vil líka langt sum teir vilja. Hetta kemur ikki óvart á nakran, ið hevur fylgt við í politikki seinastu mongu árini. Vit hava á hesum stað gjørt vart við, at Fólkaflokkurin hevur vundið úr Tjóðveldisflokkinum í málum sosum landsverksfrøðingsmálið, privatisering, fiskivinnumálum o.s.fr, tí at Tjoðveldisflokkurin hevur verið villigur til at ofra alt fyri fullveldisætlanina. Tað er væl skilligt at Tjóðveldismenn stúrsa við nú aftaná, at teir hava avreitt øll vinstravend mál til borgarligu kreftirnar í Fólkaflokkinum, uttan at fáa tað afturfyri, ið teir hildu seg fáa.

Lætt er at vera eftirsnarin, men hattar kundi man fortalt Tjóðveldisflokkinum, ið átti at lært av sínum royndum við Fólkaflokkinum. Tað má vera hart at skula ásanna, at skula út til val uppá stórt sæð einki, tí borgarligu kreftirnar hava formað allan innanlandspolitikk í seinasta valskeiði, meðan aðrir hava formulerað ST brøv og tílíkt, uttan at vera komnir á mál.

Tá hetta er sagt, so eigur Tjóðveldisflokkurin at prógva fyri fólki, at konfrontatiónslinjan riggar. Higartil er einki komið burturúr konfrontatiónslinjuni hjá teimum.

Tað tykist eisini sera margháttligt at Tjóðveldismenn royna at bagatellisera yvirtøkuna av Skipasýninum. Trygd á sjónum eigur at verða mett sum eitt av allartyngstu málum hjá eini sjóvinnutjóð, har so at siga øll inntøkan kemur frá fiskivinnu og havbúnaði. At Tjóðveldismenn meta løgregluna at vera tyngri mál enn Skipasýnið vísir bert teirra prioritering, og kann man gerast eitt sindur ørkymlaður av henni.

Álitið hjá Tjóðveldisflokkinum á Fólkaflokkin tykist fokið, men ikki kunnu teir siga, at teir ikki vóru ávaraðir frammanundan.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# »Hoyrdu tygum . . . . . ?«

Av tí, at greinin í Sosialinum fríggjadagin við navninum fyri oman av misgávum varð prentað í øðrum líki enn ætlanin var, vilja vit biðja tey, hon varð stílað til, um umbering.

Rætta orðaljóðið var hetta:

Hoyrdu tygum sendingina? - ella »Hava tygum lisið bløðini í dag?«, og sjálvandi verður soleiðis spurt, tá ið okkurt serligt er á vási.

Í fjør lýsti Vestegnens Zoneterapiskole, at hann fór undir útbúgving í zoneterapi. Vit vóru nøkur, ið meldaðu til, og so leið at teirri tíð, at skúlin skuldi byrja. Sera spennandi at vita, hvussu hetta nú fór at verða!

Fyrst í september sótu vit so á skúlabeinki, ymisk í sinn og skinn, ymiskt, hvussu aldurin var, men hin mikið umrødda viðgerðin, zoneterapi, hevði hugtikið øll - henda alternativa viðgerð, sum hon verður nevnd, hóast hon var til, langt áðrenn 'hvítir kitlar' sóu dagsins ljós.

Undirvísari var Øjvind Solbakk, og at hann hevði hegni til at undirvísa, var greitt beinanvegin - og tann niðurstøða var hin sama, tá ið skúlagongdin var av árið eftir, og øll vórðu avmyndað við prógvi í hond.

Útbúgvingin var krevjandi, má sigast, men kortini vóru øll samd um, at úrslitið var stríðið vert.

Men hvussu var so við hesum próvnum?

Og nú er at spyrja, um 'tygum hoyrdu sendingina'! Hon var at hoyra í RÁS 2 hin 16. mai í ár - beint áðrenn próvtøka okkara skuldi verða, og hon er orsøkin til, at hetta verður fest á blað.

Fólkini, ið gjørdu sendingina - verturin og ein, ið hevur virkað sum zoneterapeutur eitt áramál, fara í áðurnevndu sending rættiliga illa við tí útbúgving, ið Vestegnens Zoneterapiskole stendur fyri. Prógvið er snøgt sagt einki vert, verður sagt. Eitt lítið brot úr samrøðuni í 'Rás 2' ljóðar so: (citat) »Men tað stutta av tí langa er, at tann útbúgvingin er for vánalig, . . . . . men liggur ikki ein vandi í fyri brúkaran, at við-komandi ikki hava nóg góða útbúgving?«

»Jú, og tí vil eg siga til tykkum í Føroyum, sum kundu hugsað tykkum zoneterapiviðgerð: Hyggið eftir og spyrjið um, um viðkomandi er viðurkendur av FDZ! Tí teir zoneterapeutar, sum lúka hesi minimum krøv í Føroyum, ein í Suðuroy, 3 í Havn, . . . . og tær lúka allar treytirnar hjá FDZ! Og tað er ein viss trygd fyri brúkaran, at viðkomamdi er veruligur zoneterapeutur.

Og tað er virkiliga synd fyri hesi fólkini, sum ganga á henda skúlan og halda, at tey fáa fullfíggjaða útbúgving, og so vísir tað seg, tá ið saman um kemur, at tað er tað ikki.«

»Tú, haldi eg, brúkti myndina, tá ið tú fórt í ein hýruvogn, tá setti tú eitt krav.«

»Ja, og tað er tað minsta kravið, eg seti til ein hýruvognsførara, tað er, at hann hevur eitt koyrikort - og at ein skipari hevur pappírir, sjálvt um at tað ikki sigur mær so nógv, um eg hugdi at skiparapappírunum, men tað svarar til at koyra í einum bili, ja, við ongum skili . . ja, eg veit ikki, hvussu, man skal siga.« (citat endað).

Her verður sipað til prógvið, vit fingu eftir lokna skúlagongd.

Tað verur mett javnt við, at »ein hýruvognsførari koyrir, men hevur ongantíð fingið koyrikortið«.

Tað má átalast. Hava strevast eitt heilt ár og fáa slíkan dóm í einum fjølmiðli! Hvussu kann ein zoneterapeutur - og tað við góðari hjálp frá útvarpsmanninum - fáa seg til at siga soleiðis?

Vit fingu alt fyri eitt neyvar upplýsingar um øll viðurskifti útbúgving og møguligum virki viðvíkjandi. Har var einki ivamál. Og prógvið gevur okkum rætt til at virka sum zoneterapeutar á jøvnum føti við aðrar zoneterapeutar.

Undirvísingin í Vestegnens Zoneterapiskole er góðkend í øllum Norðanlondum, vit arbeiddu eftir føstum forskriftum, og tá ið nú sami skúli av nýggjum fer undir útbúgving, eigur álopið omanfyri ikki á nakran hátt at forða nøkrum í at søkja. Skúli og undirvísing lúka øll krøv.

Tað kenst sárt í einum fjølmiðli - sama, hvør hann er - at fáa slíka viðferð. Sera ósmæðið og lítið umhugsað at siga soleiðis. Skúli okkara - og harvið undirvísing og undirvísari - hevur øll tey 16 árini, hann hevur virkað, havt Norðanlanda góðkenning, og ístaðin fyri at ynskja sínum starvsfeløgum tillukku, tykist ætlanin vera at gera ónáðir - og tað ber illa til at forða nøkrum í tí. Men beinleiðis ósannindi, hart og týðiliga borin fram í RÁS 2, kunna ikki vera ósvarað.

Vit ikki bara mótmæla, men mótmæla harðliga!

OG! Ikki meiri frá okkara síðu um hetta mál.

Men tað liggur á ljóði, at Vestegnens Zoneterapiskole hevur stevnt. Og tað er ikki at undrast á.

**Leona Ellefsen**
**Ebba Jacobsen**
**Eyðbjørg Jacobsen**
**Marin Joensen**
**Joan Poulsen**
**Anna Olsen**
**Frida Samuelsen**
**HelenaViderø Olsen**
**Tove Simonsen**
**mangla:**
**Allan Dahl Kristensen**
**Lis í Selvindi**
**Martha Simonsen**
**Sonja í Dali**
**Inga Símunardóttir**

Sosialurin
www.sosialurin.fo

Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.



# Javnaðarfólk á Tvøroyri hava nú grivið stríðsøksina

**Eftir at hava gingið í tvíningum í 17 ár, hava gamlir fíggindar á Tvøroyri nú tikið lógvbatak og standa nú aftur sum ein maður**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*



*Hetta eru høvuðsmenninir í ósemjuni sum hevur verið ímillum javnaðarfólk á Tvøroyri í næstan 20 ár. Men gamlir høvdingar eldast og nú er stríðsøksin frivin*

Javnaðarfólk á Tvøroyri hava nú gjørt enda á eini ósemju, sum hevur vart í næstan 20 ár.

Tað var fyrst í áttatiárunum, at álvarslig fór at taka seg upp innanhysis í javnaðarflokkinum á Tvøroyri. Tað var mest um fíggjarpolitikkin hjá Tvøroyrar Býráð, at ósemjan tók seg upp, fyrst og fremst ímillum Sverra Midjord, borgarstjóra øðrumegin og Dánjal av Rana hinumegin

Ósemjan kom í hæddina í 1984, tá ið javnaðarfelagið á Tvøroyri fór í tvíningar og síðani hava tvey javnaðarfeløg verið á Tvøroyri, og stundum var rættiliga hart stríð ímillum teirra.

Froðbiar Sóknar Javnaðarfelag við Dánjali av Rana og hansara fólki og Tvøroyrar Sosialdemokratiska Felag við Sverra Midjord og hansara vongi av javnaðarfólki. Bæði feløgini hava tó verið limir í Føroya Javnaðarflokki.

## Saman í eitt felag

Men gamlir høvdingar eldast og nú er so langt fráliðið, at javnaðarflokkurin helt at tíðin var komin aftur at royna semju ímillum partarnar aftur.

Sunnudagin tók Føroya Javnaðarflokkur tí stig til ein fund ímillum tey bæði javnaðarfeløgini á Tvøroyri. Og á tí fundinum varð gjørt av at leggja feløgini bæði saman í eitt felag, sigur javnaðarflokkurin í tíðindaskrivi.

Samanlagda felagið eitur Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag, og tað verður nú hetta felagið, sum einsamalt fer at umboða Tvøroyri á landsfundinum hjá javnaðarflokkinum, sum verður í Vestmanna 15. og 16,. september.

Limirnir í samanlagda felagnum eru limirnir, sum vóru í báðum feløgunum og nýggja felagið átekur sær somuleiðis ogn og skuld hjá báðum feløgunum.

Á fundinum varð eisini fyribils lóg samtykt, og ein fyribils nevnd varð vald, í henni eru

Ketty Andreasen, formaður, Elisabeth Pearce, næstformaður, Martin S. Eidesgaard, skrivari, Solveig Bærendsen, kassameistari, umframt Poul Olsen, John Mortensen og Marner Lisberg stjornarlimir.

Umboðini hjá felagnum í floksleiðsluna hjá Føroya Javnaðarflokki eru

Ketty Andreasen, Pauli Einarsson, Elisabeth Matras Olsen og Martin S. Eidesgaard.

Lóg og nevnd verða endaliga samtykt og vald á eykaaðalfundi seinni í heyst.

## Eisini hvalbingar

Á fundinum sunnudagin varð eisini viðgjørd ein áheitan frá Hvalbiar Sóknar Javnaðarfelag um, at teir eisini kundu koma upp í nýggja felagið.

Umsóknin varð væl móttikin, og verður endalig støða tikið til samanlegging við Hvalbiar Sóknar Javnaðarfelag á eykaaðalfundinum.

Tá ið tað er veruleiki, fer Suðuroyar Norðara Javnaðarfelag sostatt, sum navnið eisini boðar frá, at umboða javnaðarfólk í allari norðari helvt í Suðuroynni.

# Føroyingar skulu taka upp eftir sær

**Løgmaður segði á ríkisfundinum í Grønlandi, at um órudd eftir føroyingar er til ampa fyri grønlendingar og grønlendsku náttúruna, so skulu føroyingar rudda eftir sær**

RÍKISFUNDUR
*Eyðun Klakstein*



*Anfinn Kallsberg*

Anfinn Kallsberg hevur um vikuskiftið verið í Grønlandi, har ríkisfundur hevur verið millum politisku leiðararnar í Føroyum, Grønlandi og Danmark.

Árligi ríkisfundurin varð hesaferð hildin í suðurgrønlendska býnum, Narsaq.

Anfinn Kallsberg, Jonathan Modzfeldt og Poul Nyrup Rasmussen viðgjørdu ymisk mál á ríkisfundinum, sum hava áhuga fyri teir tríggjar partarnar av ríkinum.

Anfinn Kallsberg greiddi grønlendska landstýrisformanninum frá, at føroyingar kenna ávísar skyldur mótvegis grønlendsku náttúruni.

– Um órudd frá føroyskum útróðri í Grønlandi er til ampa fyri grønlendingar og grønlendsku náttúruna, so skulu føroyingar rudda eftir sær, segði Anfinn Kallsberg.

Løgmaður hevur borið eygað við óruddið í sjónvarpssendingum um føroyska útróðurin í Grønlandi, og hann heldur, at tað er ein sjálvfylgja, at føroyingar taka upp eftir sær. Føroyska og grønlendska landsstýrið skulu í næstum tosa aftur um hetta mál.

## Hvalanevndin

Limaskapurin hjá Danmark í altjóða hvalaveiðukommisiónini,IWC, var eisini viðgjørdur á fundinum.

Grønland og Føroyar ynskja at fáa sín sjónarmið betri fram í IWC, og danski forsætisráðharrin hevur lovað føroyingum og grønlendingum, at málið verður tikið upp, so ein hóskandi loysn kann finnast.

Hvørki føroyingar ella grønlendingar hava kravt at fáa beinleiðis limaskap í IWC, men Anfinn Kallsberg og Jonathan Modzfeldt eru samdir um, at føroyingar og grønlendingar skulu hava størri ávirkan á donsku sjónarmiðini í IWC.

Ríkisfundur tekur ongar ítøkiligar avgerðir, men mál verða reist, og síðani verður arbeitt víðari við hesum málum.

# I AM hevur konsertir í Klaksvík

**Fríggjakvøldið 21. september fer gospelrockbólkurin I AM at hava konsert í Klaksvík, har teir ikki hava spælt í meira enn tvey ár**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Teir eru eitt tað heitasta navnið í føroyskum tónleiki í løtuni. Teir hava sín stóran lurtaraskara, og teir gera eisini vart við seg á hitlistum og konsertum.

Talan er um gospelbólkin I AM, sum nú fer at hava fyrstu konsertina í Klaksvík í meira enn tvey ár.

Bólkurin, sum er úr Klaksvík, fer fríggjakvøldið 21. september at spæla í mentanarhúsinum Atlantis, og pláss er eisini gjørt fyri møguligari eykakonsert sunnukvøldið 23. september.

I AM vóru við í Prix Føroyar finaluni í ár, og ein av sangunum, sum teir spældu tá, hevur seinastu vikurnar verið ovast á 15 teimum bestu.

Atgongumerki til konsertina við I AM fáast á Statoilstøðini í Klaksvík. Tað er bert pláss fyri stívliga hundrað fólkum í Atlantis í senn, og av tí at plássið er so avmarkað, er pláss eisini gjørt fyri møguligari eykakonsert.



*I AM fer nú at spæla á konsert í Klaksvík fyri fyrstu ferð í meira enn tvey ár*